*Myndir: Magnus Gunnarsson*




*Ford A frá 1930 og Toyota Crown frá 1970*

# Ellisakfør á Kongabrúnni

Fríggjadagin 25. apríl varð árliga flaggdagskoyringin hjá áhugafelagnum Føroya Ellisakfør í Havn.

Ellisakførini møttust á Shellstøðini við Ringvegin, har tey vórðu sýnd fram, og Føroya Shell bjóða kaffi og køkur til tey vitjandi. Síðan varð koyrt gjøgnum býin og oman á Kongabrúnna, har ellisakførini vórðu sýnd fram, meðan flaggdagshaldið á Vaglinum fór fram.

Eftir flaggdagshaldið komu nógv fólk at hyggja eftir gomlu bilunum og motorsúkklunun.

Flaggdagskoyringin hjá Føroya Ellisakførum hevur verið eitt afturvendandi tiltak, síðan felagið varð stovnað í 1992.

mg



*Stórur áhugi og dúgliga varð prátað um ellisakførini*








*Hesir Ford Anglia vóru gjørdir frá 1959 til 1967*




*VW bobla við fløggum, eygnavippum á lyktunum og Mercedes kølaragittari, síðan er ein Triumph Spitfire, VW bobla, Volvo Amazon og Triangel brandbilur*